# Nýgg met frá Vónini setir met



*Hetta er so mynd av trolinum hjá Artic Viking, tá ið tað fór av Vónini í Havn og varð ført til Ìslands, har ArcticViking tók ímóti. Hvat, ið er so serligt við hesum troli, greiða teir fegnir frá á Fish Fair*

**Á Fish Fair í ár eru tey á Vónini serliga spent upp á at vísa eitt nýtt, kollveltandi rækjutrol, sum Arctic Viking í løtuni roynir við góðum úrsliti**

**REIÐSKAPUR**

Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

## Menning og nýskapan!

Tað eru hesi bæði hugtøkini, sum standa fremst í skjøldrinum á Vónini.

Síðani trolvirkið,Vónin, varð stovnað í 1969, hevur tað ment seg til eitt tað største trolvirkið í Norðuratlantshavi.

Og er tað nakað, vónin hevur lagt dent á, er tað alla tíðina at ganga á odda við menning og nýskapan, siga Eyðstein Elttør og Jan Klein á Vónini.

- Í hesum sambandi leggja vit stóran dent á at hava eitt tætt samstarv við fiskivinnuna fyri at fáa tað besta úrslitið burtur úr og fyri at fáa hugskot og góð ráð frá teimum, sum hava tær praktisku royndirnar,sigur Eyðstein Elttør, sum er marknaðarleiðari.

Hetta samstarvið við fiskivinnuna hevur verið ómetaliga fruktagott, tí tað hevur ført til stóra menning og nógvar nýskapandi broytingar og ábøtur.

Tí ivast Eyðstein Elttør ikki í, at framyvir fer Vónin at leggja enn størri dent á samstarvið við vinnuna.

Og hann leggur afturat, at nú á døgum er tøknin ógvuliga framkomin og tað ger tað nógv lættari at samstarva við fiskivinnuna fyri at fáa úrslitið og gott sum gjørligt.

- Vit hava ein simulator, so kemur ein skipari við einum góðum hugskoti um broytingar, fyri at gera eitt trol enn betri, kunnu vit leggja tað inn á simulatorin og so kunnu vit síggja úrslitið av broytingunum verður.

## Slóðbrótandi trol

Eitt ítøkiligt úrslit av einum slíkum samstarvi ímillum framleiðara og fiskivinnu, verður at síggja á Fish Fair hesuferð.

Har fer Vónin at vísa fram eitt nýskapandi og slóðbrótandi rækjutrol, sum er roynt við sera góðum úrsliti.

Jan Klein, sum hevur við rækjutrol at gera á Vónini, sigur, at trolið er roynt umborð á Arctic Viking og afturmeldingarnar, teir hava fingið eru sera positivar.

Nýggja rækjutrolið er ment í samstarvi við ArcticViking.

Á Vónini fingu tey eitt hugskot um, hvussu rækjutrolini kundu broytast til tað betra. Broytingarnar vórðu lagdar yvir á simulatorin og við internetinum varð simulatormyndin síðani yvir til Arctic Viking, sum varð staddur undir Eysturgrønlandi.

Samskiftið ímillum skip og virkið hevur síðani ført til tað lidna úrslitið, sum nú verður marknaðarført á Fish Fair.

Á Vónini vilja teir ikki avdúka ov nógv um tað nýggja trolið, men á básinum á Fish Fair eru teir fúsir at greiða frá.

Men ein broyting er, at tað nýggja trolið hevur 400 meskar fleiri enn eitt vanligt rækjutrol og tað ger, at tað skverar nógv meir. Men kortini er tað lættari at toga enn tey vanligu trolini.

## Seta met

Jan Klein sigur, at nú er hetta nýggja trolið roynt umborð á ArcticViking og hann er sera væl nøgdur við afturmeldingarnar frá skipinum.

- Tað eru bara positivar, sigur hann.

Skiparin á Arctic Viking sigur, at við nýggja trolinum toga teir 0,2 - 0,3 míl skjótari við somu motorkraft.

Somuleiðis hevur skiparin staðfest, at teir klára at toga við eini ferð upp á yvir trý míl, uttan at missa skverið.

- Við hinum trolunum komu vit ikki uppum 2,5 míl, so stóð sum i berginum, sigur hann.

Hann vísir eisini á, at tað tykist sum um, at nýggja trolið fylgir botninum betri, tá ið teir toga á ósløttum og tað fer heldur ikki so lætt uppfrá, tá ið meiri verður koyrt á.

Hann leggur afturat, at við nýggja trolinum er hæddin at kalla tann sama, um 11 metrar, og skverið er heldur meir við somu stilling á lemmunum. Somuleiðis er lættari at stýra og at koma runt.

Hann sigur eisini, at tá ið teir hava upptøkutól á, síggja teir, at ferðin er meir á ristunum við hesum trolinum, enn við hinum og so at siga ongar rækjur standa í netinum.

Enn heldur skiparin á Arctic Viking, at tað er nakað tíðliga at gera nakra endaliga niðurstøðu um fiskaríið við hesum trolinum, mótvegis teimum vanligu.

Men fyrstu ábendingarnar eru góðar, hevur hann boðað Vónini frá.

- Um tað er av tilvild, veit eg ikki, men vit hava so fingið besta og næstbesta fiskidag í krónum nakrantíð, síðan Arctic Viking kom fyri 20 árum síðan, sigur hann í eini fráboðan til vónina

Men hóast tað nýggja trolið hevur allar hesar fyrimunirnar, eru tað kortini væl bíligari enn tey vanligu rækjutrolini.

